# Savnaði 66.500 krónur til Skálavíkar



*John Myllhamar (høgrumegin) handar borgarstjóranum í Skála, Linjohn Christiansen kekkin við teimum 66.500 krónunum*

*Mynd: bkv.fo*

**Tað fer at kosta slakar 800.000 krónur at umvæla skaðarnar á havnina í Skálavík eftir illveðrið seinast í januar, vísir ein kostnaðarmeting, Landsverk hevur gjørt**

**BRIMSKAÐI**
*Snorri Brend*

Landsverk metir, at tað fer at kosta 776.000 krónur at gera tær umvælingar, sum eru neyðugar fyri at havnin skal vera í sama standi sum áður.

Í somu frágreiðing stendur, at aldan sum rakti Skálavík illveðurskvøldið, var einar átta metrar høg, skrivar uf.fo.

Síðani ódnina hava fólk havt møguleika at lata pening til eina serstaka konto, hvørs endamál var at stuðla afturgerðini av skaðunum í kommununi.

Fyri hesum tiltakinum stóð John Myllhamar úr Sandavági. Týsdagin handaði hann Linjohni Christiansen, borgarstjóra í Skálavík ein gávukekk uppá 66.500 krónur.

Júst henda innsavningin er nú liðug, men fólk, ið hava hug at stuðla endurreisnini kunni seta pening inn á eina konto í Føroya Banka við heitinum "Kyndilsmessuódnin".

Nevnast kann, at Sands Kommuna eisini hevur latið eina peningagávu til kommununa.


ART Listagluggin GALLERIE

**Seinasti dagur framsýningin er opin, er í morgin leygardagin**

**50 listaverk**

Waagstein • Mikines • I. av Reyni • Glerfoss • Frimod Joensen • Kampmann • W. Heinesen
Z. Heinesen • E. av Reyni • K. Svensson • T. Olsen • O. við Neyst • Bent Restorff o. fl.



Umleið 50 listarverk eru til sølu millum annað hesi:



Mikines



Waagstein



Svensson

**Listagluggin**
Niels Finsensgøta 25, Tórshavn
Tlf. 322022 - 210022
e-mail: listagluggin@hotmail.com

**Opið:**
tý - frí : 15.00 - 17.30
ley : 11.00 - 14.00
*Annars eftir nærri avtalu!*





Íløguráðgeving - royn Skjern Bank



Gunnar Streymoy
Íløguráðgevi
Tlf. 516227
gst@skjernbank.dk

Skjern Bank bjóðar íløgumøguleikar, ið hóska júst til tín tørv.

Fá eitt prát við Gunnar Streymoy og hoyr nærri um tínar møguleikar.

www.skjernbank.dk
SKJERN BANK



**Mentamálaráðið**
FÓLKASKÚLADEILDIN

## LEIÐARI TIL SKÚLATILBOÐ TIL UNG VIÐ BREKI

Mentamálaráðið sóknast eftir einum dugnaligum leiðara til skúlatilboðið til ung við breki, Rásin, í Runavík. Leiðarin skal samskipa skúla, arbeiði og frítíð hjá næmingunum og hava fyrisitingarligu, námsfrøðiligu og fíggjarligu ábyrgdina av skúlatilboðnum.

Rásin er eitt skúlatilboð til ung við breki. Endamálið við tilboðnum er at fyrireika tey ungu til at klára seg sjálv í gerandisdegnum eftir lokið skúlaskeið. 6-8 næmingar eru á Rásini, og 5 starvsfólk eru knýtt at stovninum.

Fyrisitingarliga er skúlatilboðið beinleiðis undir Fólkaskúladeildini. Talan er um samdøgurstilboð til 6-8 menningartarnað fólk í aldrinum frá 18 til 27 ár.

**Søkt verður eftir leiðara, sum:**
- hevur ábyrgd av undirvísingini og námsfrøðiligu tiltøkunum
- hevur ábyrgd av at skipa frítíðina hjá næmingunum
- hevur ábyrgd av vælferð næminganna alt samdøgrið
- hevur ábyrgd av saman við ráðgevandi bólkinum at áseta innihaldið í skúlatilboðnum
- hevur dagligu umsitingina av fíggjarligu viðurskiftunum
- setir starvsfólk
- skal leiða og skipa arbeiðið hjá 4-5 starvsfólkum
- í tøttum samstarvi skal samskifta og ráðføra seg við Mentamálaráðið um tilboðið
- skal vera skrivari hjá ráðgevandi bólkinum og gera allar fyrisitingarligar uppgávur í hesum sambandi.

**Harumframt skulu umsøkjarar:**
- hava hug og hegni at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- vera førir fyri at loysa trupulleikar
- vera førir fyri at røkja starvsfólkasamstarvið

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava námsfrøðiliga útbúgving ella aðra viðkomandi útbúgving.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarar hava:
- royndir at arbeiða við ungum við breki
- eru nýhugsandi og duga at síggja tørvin hjá tí einstaka

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið er flokkað sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Setanin er tíðaravmarkað fyribils til 1. august 2009 við møguleika fyri framhaldi.

**Umsóknir**
Umsókn saman við prógvi, C.V. o.ø. skal verða Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi 4. mars 2008.**

Umsóknin verður stílað til:
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Janus Jensen, undirvísingarleiðara, á tlf. 355050, ella fara á heimasíðu ráðsins: www.mmr.fo (undir teiginum leys størv).

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

sansir.fo